VIÐMERKINGAR

# Vegleiðing til Jenis av Rana

HEINI Í SKORINI
Lesandi

**Formaður Miðfloksins tykist hava misskilt míni sjónarmið, skrivar Heini í Skorini**

Í seinastu viku hevur formaður Miðfloksins, Jenis av Rana, nakrar viðmerkingar til undirritaða í sambandi við støðu teirra samkyndu í Føroyum.

**Samdir**
Jenis fýlist á, at undirritaði »skuldsetur Bill Justinussen fyri at villleiða í hesum sama máli, tá hesin førir fram, at málið í veruleikanum viðvíkur homosexualiteti«.

Til hetta er at siga, at sjálvandi er motivatiónin handan broytingaruppskotið støða teirra samkyndu, og ta sannroynd havi eg ikki dult. Tvørturímóti skrivi eg, at paragraffin »sjálvsagt er ætlað serliga hóttum og trýstum minnilutum«. Eins og myndugleikar hava ítøkiligar samfelagsbólkar í huga, tá teir velja at nevna rasu, húðarlit, nationalitet, etniskan uppruna og trúgv í somu paragraff, vóru tey samkyndu hesaferð bakgrundin fyri broytingaruppskotinum um at skoyta seksuella orientering uppí. Tað er eingin loyna, at ítøkiligar støður hjá ítøkiligum samfelagsbólkum er orsøkin til paragraff 266b og allar mannarættindakonventiónir annars. Hetta er undirritaði púra samdur við Jenisi í, og tí raka atfinningar Jenisar við síðuna av.

Tað, eg harafturímóti skuldseti Bill fyri, er, at hann í Kjakinum í SvF gjørdi mun á hesum seinasta initiativinum fyri tey samkyndu og síðani restini av paragraffini. Bill vildi tí ikki viðurkenna ta sannroynd, at broytingaruppskotið byggir á júst sama logikk og motivatión, sum restin av paragraffini ger, nevniliga at verja hóttar og trýstar minnilutar.

Hetta er tað, míni sjónarmið snúðu seg um, og hava tey tí lítið við atfinningar Jenisar at gera.

**Viðmerkingarnar**
Jenis av Rana vísir síðani til viðmerkingarnar til broytingaruppskotið um at víðka mannamunsgreinina og sigur, at her royna uppskotsstillararnir »at sannføra um, hvussu neyðugt tað er við serverju fyri hesi«. Aftur her fer Jenis skeivur. Orðini »serverja«, serrættindi ella serlóggáva eru ongantíð nevnd gjøgnum allar viðmerkingarnar, og er hetta enn ein roynd at billa føroyingum inn, at samkynd nú skulu takast fram um aðrar samfelagsbólkar.

Mótvegis pástandinum hjá Jenisi stendur orðarætt at lesa í viðmerkingunum hjá Finni og Annitu, at »málið snýr seg um at tryggja einum bólki nøkur mannarættindi. Málið snýr seg um, at vit í Løgtinginum eiga at verja ávís fólk móti mannamuni og happing«. Hetta, og einki annað, er endamálið við uppskotinum, og tí kann eg endurtaka míni orð um, at talan ikki er um serlóggávu ella serrættindi, men um javnrættindi og fyribyrging av mannamuni. Tí siga viðmerkingarnar onga aðra søgu enn hana, sum undirritaði hevur víst á, og tí byggir partur av kampagnuni hjá nei-síðuni framvegis á bluff.

**Miðflokkurin og mismunur**
Og tað gerst heilt tragikomiskt, tá Bill Justinussen í almennari heilsan til Gerhard Lognberg í seinastu viku skrivar, at Miðflokkurin ikki tekur undir við at gera mismun á fólki. Um Miðflokkurin ikki tekur undir við at gera mismun á fólki, og um lógaruppskotið orðarætt snýr seg um »at verja fólk móti mismuni«, hvør er so trupulleikin hjá Miðflokkinum?

# Fríðrikur Petersen, fyrsti formaður Sambandsfloksins

KAJ LEO JOHANNESEN
Sambandsflokkurin



**– Fleiri av stovnarum Sambandsflokkin hava skapt tjóðskaparverk á høgum støði. Tí kunnu vit av røttum spyrja, hví føroyskar søgubøkur ikki hava gjørt meira fyri at lýst hendan partin av søguni, skrivar Kaj Leo Johannesen**

Føroysk tjóðskaparrørðsla byrjaði at gera um seg í Keypmannahavn í 1870-árunum. Í 1876 tóku 12 føroyskir studentar seg saman um at skipa eina føroyaveitslu.

Veitslan stóð á Regensen, hjá John Effersøe sum læs til lækna. Til veitsluna hevði tann tá 23 ára gamli Fríðrikur Petersen, sum las gudfrøði, yrkt tvær fosturlandsyrkingar, tær fyrstu av sínum slag nakrantíð á føroyskum. Yrkingarnar vóru »Føroya skál« og »Føroyska málið« (O,móðurmál…) Saman við Hjalmari Hammershaimb yrkti hann eisini »Drykkjuvísa« og árið eftir »Fyri minninum«.

Av yrkingum eftir Fríðriki Petersen kunnu nevnast:
Eg oyggjar veit (1877)
Hvat kann røra hjartastreingir (1878)
Gevið Brøður (1878)
Bróður skál (1879)
Gleðilig Jól (1891)
Tíðin rennur sum streymur í á (gamlaárskvøld 1891)
Deyði hvar er nú broddur tín (1900)
Hvørjum man tykjast vakurt hjá sær

**Jógvan Poulsen**
Lat okkum nevna ein annan fosturlandsson, sum kallaðist Jógvan Poulsen. Hann sæt á tingi í samfull 45 ár (frá 1883 – 1928) og var ein av stovnarum Sambandsfloksins.

Jógvan Poulsen skrivaði ta fyrstu føroysku skúlabókina (bíbliusøguna) sum føroyingafelag gav út 1900.

Jógvan Poulsen skrivaði eisini, saman við Christiani Ludvig Johannesen, tað fyrstu føroysku stavingarbókina og lesibókina, og var somuleiðis við til at stovna Føroya lærarafelag í 1898

Meginparturin av hesum valaverkum frá mætum fosturlandssynum og fyrrverandi tingonnum Sambandsfloksins, hava tað til felags, at verða tjóðskaparverk á høgum støði, og kunnu vit av røttum spyrja, hví føroyskar søgubøkur ikki hava gjørt meira fyri at lýst henda partin av søguni?

# Svar til Finnur Helmsdal løgtingsmann viðvíkjandi ískoytispensjón úr øðrum norðurlandi

HANS PAULI STRØM
Landsstýrismaður



**– Føroyingar við ávísum treytum kunnu vinna sær rætt til ískoytispensjón frá øðrum norðurlandi enn danska kongaríkinum, og Almannastovan metir, at hon kann kunna betur um hesar møguleikar, sigur Hans Pauli Strøm**

Finnur Helmsdal, løgtingsmaður setti í opnum brævi, sum var at lesa í bløðunum tann 6. januar í ár, undirritaða landsstýrismanni í almanna- og heilsumálum fyrispurning um møguleikarnar ella rættin hjá føroyingum at fáa ískoytispensjón fyri tíðarskeið, ein hevur arbeitt í Svøríki, Noregi ella øðrum norðurlandi. Um svarið varð játtandi, ynskir Finnur Helmsdal harumframt at vita, um Almannastovan kunnaði nóg væl um henda møguleika.

Finnur Helmsdal setti spurningin av tí at tað í Danmark er komið fram, at rættiliga fáir danir hava fingið tað, teir hava havt rætt til í hesum sambandi, tí teir, sambært Finni Helmsdal, verða ov illa kunnaðir um rættindi teirra.

Í stuttum er svarið, at fc. Alt hetta verður greitt gjølliari frá niðanfyri.

**Rætturin til pensjón**
Í øllum norðurlondum er pensjónsskipanin bygd upp við eini grundpensjón og eini ískoytispensjón (ella arbeiðspensjón), ið eru lógarfestar. Grundpensjón svarar til okkara fólkapensjón (grundupphædd og viðbót). Ískoytispensjónin kann samanberast við arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin, "Samhaldsfasti" hjá okkum. Tó bara á tann hátt, at allir løntakarar og arbeiðsgevarar gjalda inn í grunnin. Útgjaldstreytir og útgjaldsupphæddir kunnu ikki samanberast.

Útgjaldið í hinum norðurlondunum er ikki treytað av, at tú býrt í viðkomandi landi. Hevur tú arbeitt ávíst minstatíðarskeið (1 ár) í landinum, hevur tú rætt til útgjald av innvunnari ískoytispensjón. Útgjaldsupphæddin er treytað av innvinningartíð og inngjaldi.

Í einstøkum norðurlondum (t.d. Svøríki) minkar grundpensjónin tá ískoytispensjónin veksur. Í Noregi og Danmark (ATP) ávirkast grundpensjónin ikki av ískoytispensjónini.

Føroyingar, sum fara í onnur norðurlond at arbeiða, vinna rættin til ískoytispensjón frá viðkomandi landi, tá teir hava starvast í samanlagt 1 ár, grundað á inntøku frá fyrsta degi.

Uppspard pensjónstíð verður roknað í 40.-partum, tí at ein persónur hevur rætt til fulla pensjón í Føroyum um so er, at viðkomandi hevur verið búsitandi í danska ríkinum í 40 ár eftir at vera fyltur 15 ár. Tað eru 52 ár millum 15 og 67 ár. Sostatt ber í mesta lagi til at vinna rætt til 12/40 afturat føroysku pensjónini, uttan at hetta ávirkar føroysku pensjónina.

Møgulig pensjón (grundpensjón og ískoytispensjón) frá einum øðrum norðurlandi verður útgoldin frá arbeiðslandinum. Sum er, eru nógvir føroyingar, sum fáa pensjón, herundir ískoytispensjón, frá einum øðrum norðurlandi, uttan at tað ávirkar føroysku pensjónina.

Er talan um privata (sáttmálabundna) eftirlønarskipan, sum arbeiðstakarin/arbeiðsgevarin rindaí arbeiðslandinum, er tað vanliga tann stovnurin, sum umsitur hesa pensjónsskipan, sum kunnar sínar limir og ger vart við rættindi og skyldur.

**Kunning**
Ein av spurningunum á umsóknarbløðunum hjá Almannastovuni um fólka- og fyritíðarpensjón er, um ein hevur havt bústað uttanlands, t.v.s. uttan fyri danska ríkið aftaná 15. árið. Umsóknarblaðið verður nú broytt, fyri at nágreina spurningin um arbeiði uttanlands, og verður spurningurin um bústað uttanlands tá broyttur til, um umsøkjarin hevur havt bústað og/ella arbeitt uttanlands.

Almannastovan hevur faldarar um fyritíðar- og fólkapensjón, har kunnað verður um møguleikan fyri pensjón úr øðrum norðurlandi, um ein hevur havt bústað/arbeiði har.

Í kunningarritinum, sum sent varð í hvørt hús í Føroyum seinasta heyst, verður møguleikin nevndur.

Á heimasíðuni hjá Almannastovuni verður kunnað um arbeiði uttanlands, men bert um møguleikan at sleppa undan at rinda til sosialu skipanirnar í arbeiðslandinum. Orsøkin til at fólk ynskja at verða undantikin fyri at rinda hesi gjøld er, at talan er um rættiliga nógvan pening. Men tey, sum venda sær til Almannastovuna hesum viðvíkjandi, verða eisini kunnað um, at tey samstundis frásiga sær rættin til m.a. pensjón frá arbeiðslandinum seinni í lívinum. Kunning um hetta verður lagt út á heimasíðuna í næstum.

Sosialurin
www.sosialurin.fo

**Innsent tilfar**
Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.
Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.